Teldutilboð til KT Landsins

Fyri, at teldurnar skulu passa inní verandi skipanir, og fyri at kunna endurnýta sum mest av eyka útgerð, er ynski um, at teldurnar eru av merkjunum, ið eru frammanundan góðkend av KT Landsins.

Hervið verður biðið um tilboð uppá: 50 stk. farteldur við tilhoyrandi dokking støð, av merkinum HP, Lenovo, Fujitsu, Dell ella Microsoft og 20 stk borðteldur av merkinum HP, Lenovo, Fujitsu ella Dell.

Farteldur:

Minstu krøv til farteldurnar eru hesi:

- Intel Core i5-8250U
- 256 GB SSD Harðdisk
- 8 GB RAM
- TPM 2.0
- Innbygt gigabit netkort
- 13-14,5” skerm
- Full HD (1920x1080) upploysing
- Metal ella kolfibur kabinett (palmrest, lok og botnur - minst 2 av 3 skulu vera úr metal/kolfibur)
- Vekt 1,5 kg
- Innbygdan fingramerkis lesara
- Tráðleyst netkort (Dual Band 802.11a/b/g/n/ac), ið stuðlar Miracast
- Bluetooth 4.1
- USB 3.1 og USB Type-C
- Innbygd webcam, hátalarar og mikrofon
- Stuðla dokkingstøð (ikki Bluetooth, WiGig o.til). **GG. USB-C dokkingarstøðir verða tó góðtiknar.**
- Stuðla 2 eksternum skermum tá teldan er dokkað (við HDMI ella Displayport) við upploysn á 3840x1600
- Streymveiting til teldu og dokkingstøð = 2 stk.
- 3 ára garanti, frá tí at teldan er útflýggjað. Er garanti ikki er eins fyri allar lutirnar ynskist hetta útgreinað

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

- Skal lúka umhvørvisgóðkenningar so sum Svanamerki ella EPEAT Gold
- Veitarin skal vera góðkendur av framleiðaranum, antin sjálvur ella ígjøgnum triðjapart, til at gera umvælingar av telduútbúnaðinum í Føroyum.
- Mest loyvda leveringstíð er 14 dagar

Soleiðis vera tilboðin fyri farteldur vektað:

Vekting:	**%**
Prísurin á farteldum	62
Útyvir minstakrav[**1**]	5
Vekt á farteldu	14
Støddar mát á farteldu	14
Battarítíð á farteldu	5
Samlað	100

[**1**] Útyvir minstakrav er tað, sum teldan hevur útyvir minstu krøvini. Tað kann verða fult Metall/kolfibur kabinet, meira RAM, CPU o.s.fr. Tað vil vera ein meting í hvussu nógv hvør eyka funktión telur.

Tey, sum lata tilboð inn uppá borðteldur, skulu útfylla og lata inn hjálagda svar skjalið:

” **Tilboð - Lagurteldur 2020 - Farteldur - VEITARI.xlsx**”.

Borðteldur:

Minstu krøv til borðteldurnar::

- Intel Core i5-8250U
- 256 GB SSD Harðdisk
- 8 GB RAM
- TPM 2.0
- Innbygt gigabit netkort
- Tráðleyst netkort (Dual Band 802.11a/b/g/n/ac)
- Stuðla 2 skermum (við HDMI ella Displayport) við upploysn á 3840x1600
- Tastatur og mús skal verða við.
- Støddin skal ikki verða størri enn Mini-PC (dømir: HP EliteDesk 800 G5 Desktop Mini PC og FUJITSU Desktop ESPRIMO Q920)
- Windows 10 Pro OEM stýriskipan
- 3 ára garanti, frá tí at teldan er útflýggjað.
- Skal lúka umhvørvisgóðkenningar so sum Svanamerki ella EPEAT Gold
- Veitarin skal vera góðkendur av framleiðaranum, antin sjálvur ella ígjøgnum triðjapart, til at gera umvælingar av telduútbúnaðinum í Føroyum.
- Mest loyvda leveringstíð er 14 dagar

Soleiðis vera tilboðin fyri borðteldur vektað:

Vekting:	**%**
Prísurin á farteldum	90
Útyvir minstakrav[**1**]	10
Samlað	100

[**1**] Útyvir minstakrav er tað, sum teldan hevur útyvir minstu krøvini. Tað kann verða meira RAM, CPU at teldan er passivt køld o.s.fr. Tað vil vera ein meting í hvussu nógv hvør eyka funktión telur.

Tey, sum lata tilboð inn uppá borðteldur, skulu útfylla og lata inn hjálagda svar skjalið:

” **Tilboð - Lagurteldur 2020 – Borðteldur - VEITARI.xlsx**”.

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum – um nakað – tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.

KT Landsins sær rættin til at taka av tilboðið uppá farteldur frá einum veitara, og tilboð uppá borðteldur frá øðrum veitara.

Veitarin er vælkomin at bara geva inn tilboð uppá farteldur ella bara borðteldur, og eisini er veitarin vælkomin at tilskila ein prís, um so er at tikið verður av báðum tilboðunum frá sama veitara.

Um vøran verður latin seinni enn til avtalaðu tíð, tilskilar KT Landsins sær rættin til at taka hettar við í viðgerðina tá næsta útboð er til viðgerðar.

Tilboðið skal stílast til:

KT Landsins T-postur: ktskivan@gjaldstovan.fo

Øll, sum hava latið tilboð inn, fáa svar um niðurstøðuna. Keypari metir seg kunna geva svar, um tikið verður av tilboðnum ella ikki, umleið 1 viku, eftir at tilboðsfreistin er farin.

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri.

Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og annars viðgjørdir skrivliga við tí fyri eyga lættari at kunna skjalprógva samskiftið.

Spurningar skulu stílast til:

Bjarni Fríðberg
bjarni@gjaldstovan.fo

Fartlf.: 79 24 93

Við hesum verður takkað fyri áhugan og verður sæð fram til at hoyra aftur frá tykkum.

Vinaliga heilsan
KT Landsins - Gjaldstovan